gult2 cyan2 magenta2 svart2



# Ein stórur dagur

**– Hetta er nakað, vit hava stríðst fyri í fimm ár, sigur Ása Olsen, forkvinna í Heilsuhjálparafelag Føroya**

SKÚLASKAPUR
*Áki Bertholdsen*



*Ása Olsen, forkvinna í Heilsuhjálparafelag Føroya*

– Tað var ein stórur dagur fyri okkum, tá ið undirvísingin byrjaði á nýggja almanna- og heilsuskúlnum á Tvøroyri mánamorgunin.

– Tað sigur Ása Olsen, forkvinna í Heilsuhjálparafelag Føroya.

Heilsuhjálparafelagiðer tað, sum fyrr nevndist Heimahjálparafelag Føroya. Men á aðalfundinum seinast varð gjørt av at broyta navnið á felagnum til Heilsuhjálparafelag Føroya.

Ása Olsen sigur, at nýggi almanna- og heilsuskúlin er eitt mál, sum felagið hevur arbeitt fyri síðani 1996.

–Tí eru við ómetaligar fegnar um, at skúlin nú loksins er veruleiki. Tað er, sum at nú síggja vit endiliga eitt úrslit av tí, sum sum hevur verið okkara hjartamál hesi seinastu fimm árini.

## Ein tungur burður

Men tað skerst ikki burtur, at almanna - og heilsuskúlin hevur verið ein tungur burður.

– Hvussu strilti, tað hevur verið at fáa skúlan settan á stovn, kann best lýsast við, at Torbjørn Jacobsen er níggjundi landsstýrismaður, sum hevur havt málið undir hond við tí í hyggju at seta skúlan á stovn.

–Vit hava stríðst fyri hesum skúlanum síðani í apríl í 1996. Tað er eisini fleiri ferðir komið so langt, at nú skuldi skúlin byrjað – men tað er hvørja ferð útsett. Skúlin hevur eisini ligið og rikist ímillum umsitingarnar, tí onkuntíð skuldi hann liggja undir Almanna -og heilsumálastýrinum og aðrar tíðir skuldi hann liggja undir Undirvísingar og mentamálastýrinum, so hann hevur verið ein kastibløka ímillum tey ymsu stýrini hjá landinum.

Einasta útbúgvingin, sum áður hevur staðið heimahjálparum í boðið, er eitt skeið uppá seks vikur.

– Men tað varð hildið uppat við tí í 1996, tí tá skuldi hesin skúlin byrjað. Síðani hevur ongin útbúgving verðið fyri heimahjálpir, fyrrenn nú.

Hon sigur, at hesin skúlin fer at uttan iva at lyfta heimahjálpina í Føroyum upp á eitt heilt annað støðið.

– Nú fáa heimahjálpirnar eina veruliga útbúgving um eldrarøkt og tað kann ikki annað enn síggjast aftur í heimarøktini og tað fer avgjørt at hava ein sera stóran týdning.

## Ger tað sama

Tá ið tað í fjør varð gjørt av at leggja skúlan á Tvøroyri, elvdi tað til stóra mótstøðu og eisini Heimahjálparafelagið mutaði ímóti, at skúlin varð lagdur á Tvøroyri.

– Tað var ikki tí, at vit hava nakað ímóti, at skúlin er á Tvøroyri. Okkara mótstøða ímóti ætlanini at leggja skúlan á Tvøroyri, skal heldur síggjast í ljósinum av, at vit stúrdu fyri, at nú fór málið enn einaferð at detta niðurfyri, eins og tað varð dottið niðurfyri so mangan áður.

– Beint eftir at tað varð avgjørt, at skúlin skuldi leggjast á Tvøroyri høvdu vit fund við Torbjørn Jacobsen, og tá lovaði hann okkum, at hann skuldi ikki detta niðurfyri aftur.

–Hann hevur so hildið orð og tað kunnu vit bara takka honum fyri, sigur Ása Olsen.

Hon sigur, at tað ger tað sama, hvar í landinum, skúlin er, tí tað verður altíð onkur, sum skal ferðast til og frá.

Tvørturímóti heldur hon, at í hvussu so er, er ein stórur fyrimunur við at skúlin er á Tvøroyri. Og tað er, at Tvøroyrar Býráð hevur gjørt greitt, at barnaansing skal ikki vera ein trupulleiki fyri at nakar skal kunna koma á skúlan.

– Tað trygdina høvdu aðrar kommunur í landinum havt stórar trupulleikar at veitt teimum lesandi.

Ása Olsen vísir eisini á, at ein av næmingunum, sum byrjaði mánadagin, hevur eitt barn við, men at tað fekk ansingarpláss beinanvegin.

Hon heldur eisini, at Tvøroyrar Kommuna hevur gjørt eitt stórt arbeiði við at útvega høli og at

# Fiskaðu fyri 140 milliónir krónur í tríggjar mánaðir

**Tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár høvdu útróðrarbátarnir rokfiskiskap**

ROKFISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*



*Útróðrarflotin er tann bólkurin, sum hevur lagt nógv tað størsta virðið upp á land í fyrsta ársfjórðingi í ár. Partrolararnir hava avreitt fyri næstmest, men teir hava avreitt fyri yvir 50 milliónir minni enn útróðrarbátarnir hava*

Árið í ár hevur verið eitt rættiligt rokár hjá útróðrarbátunum.

Í hvussu so er tann fyrsti parturin av árinum.

Ein fyribils uppgerð yvir fiskiskapin hjá føroyskum bátum og skipum vísir, at tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár, fiskaðu útróðrarbátarnir fyri yvir 58 milliónir meiri, enn teir fiskaðu fyri tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í fjør.

Uppgerðin vísir, at fyrsta ársfjórðing í fjør, fiskaðu útróðrarbátarnir fyri 83,1 millión. Men ein fyribils uppgerð yvir fiskisikapin í januar, februar og mars í ár, vísir, at hesar tríggjar mánaðirnar í ár, hava teir fiskað fyri heilar 141,3 milliónir.

Sostatt er avreiðingarvirðið hjá útróðrarflotanum vaksið heilar 58,2 milliónir tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár, afturímóti sama tíðarskeiði í fjør.

**Serliga teir minnu**

Fyribilstølini vísa, at tað eru serliga teir minnu útróðrarbátarnir, teir undir 15 tons, sum hava rokast í fyrsta ársfjórðingin í ár.

Hjá teimum er avreiðingarvirðið tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár nevniliga heili 155% hægri enn tað var í sama tíðarskeiði í fjør.

Fyrsta ársfjórðing í fjør avreiddu teir minnu útróðrarbátarnir fyri 19,5 milliónir, men fyrsta ársfjórðing í ár hava teur avreitt fyri ikki minni enn 49,6 milliónir, ella fyri heilar 30,1 millión meiri.

Men teir størru útróðrarbátarnir, teir yvir 15 tons, kunnu heldur ikki lata illa at, tí tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár, avreiddu teir fyri 44% meiri, enn teir avreiddu fyri í fjør. Í januar, februar og mars í fjør, avreiddu teir størru útróðrarbátarnir fyri 63,6 millión, men í sama tíðarskeiði í ár hava teir avreitt fyri 91,7 milliónir, ella fyri 28,1 millión meiri.

Hesin frálíki fiskiskapurin hevur eisini gjørt útróðrarflotan til tann bólkin, sum í fyrsta ársfjórðingi í ár hevur lagt nógv tað størsta avreiðingarvirði eftir seg av øllum teimum skipabólkum, sum fiska botnfisk.

Tann skipabólkurin, sum kemur útróðrarflotanum næst, eru partrolararnir, sum hava avreitt fyri 91,2 milliónir í fyrsta ársfjórðingi í ár. Tað eru 50,1 millión minni enn útróðrarbátarnir hava.

Tað vil so aftur siga, at taka vit teir størru útróðrarbátarnar yvir 15 tons, burturúr, hava teir avreitt fyri meiri enn partrolararnir hava, tí teir hava avreitt fyri 91,7 milliónir í januar, februar og mars í ár, ella fyri 500.000 meiri enn partrolararnir hava avreitt fyri.

Í fjør sá myndin øðrvísi út. Tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í fjør høvdu partrolararnir tað hægsta avreiðingarvirði, teir avreiddu tá fyri 87,5 milliónir. Tað var eitt lítið sindur meiri enn útróðrarflotin, sum avreiddi fyri 83,1 milliónir í fyrsta ársfjórðingi í fjør.

**Meiri fiskur og betri prísur**

Orsøkin til tað stóru framgongdina hjá útróðrarflotanum er bæði tann, at tað hevur verið meiri fiskur at fáa og at teir hava fingið betri prís fyri fiskin.

Tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í fjør, fiskaðu teir størru útróðrarbátarnir fyri 3.900 tons og teir smærru, 1.200 tons, ella tilsamans 5.100 tons.

Tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár hava teir størru útróðrarbátarnir fiskað 5.000 tons, ella 1.100 meiri enn í sama tíðarskeiði í fjør.

Teir smærru bátarnir hava fiskað 2.900 tons, ella heili 1.700 tons fleiri enn í sama tíðarskeiði í fjør.

Í fjør var miðalprísurin á útróðrarfiskinum 16,49 krónur fyri kilo hjá teimum størru bátunum og 16,72 hjá teimum smærru. Í ár var miðalprísurin 18,49 krónur fyri kilo hjá teimum størru bátunum og 17,25 krónur fyri kilo hjá teimum smærru bátunum.

Nógv tað mesta av tí, teir fiska, er toskur og hýsa. Fyrsta ársfjórðing í fjør fiskaðu teir størru útróðrarbátarnir 2.100 tons av toski og 1.100 tons av hýsu. Tølini fyri fyrsta ársfjórðing í ár eru ávikavist 3.200 tons og 900 tons.

Teir smáu útróðrarbátarnir fingu góð 800 tons av toski í fyrsta ársfjórðingi í fjør og góð 200 tons av hýsu.

Í sama tíðarskeiði í ár hava teir fingið ávikavist 2.500 tons av toski og góð 200 tons av hýsu.

Í fyrsta ársfjórðingi í fjør var toskaprísurin ímillum 17 og 18 krónur í miðal fyri kilo og hýsuprísurin lá ímillum slakar 14 krónur og knappar 15 krónur.

Í sama tíðarskeiði í ár hevur toskaprísurin verið upp í slakar 19 krónur fyri kilo og hýsuprísurin upp í slakar 15 krónur.



Minningarorð um lítla
**Allan Siwanantham Jacobsen, Miðvágur**
føddur 01.10.94
deyður 20.03.2001

Góði elskaði Allan. Ikki vardi tað okkum, at tú so brádliga skuldi vera tikin frá okkum, nú tit júst vóru flutt til Føroyar at búgva, og alt skuldi vera so gott.

Tú vart so glaður at vera komin higar og sleppa at spæla úti, sum tú vildi, aftaná at hava búð niðri í Ishøj tey seks árini, sum tær untist at liva.

Eg síggi fyri mær enn hvussu fittur og spentur tú kom úr flogfarinum við tasku á rygginum, tá vit vóru og tóku ímóti tær og systkjunum.

Tú komst at vera hjá ommu og abba saman við systkjunum, Sithu og Akexander tvær tær fyrstu vikurnar, meðan mamma og pápi tín gjørdu klárt at flyta. So komu tey heim og alt tyktist at vera so gott.

Tú byrjaði í barnagarði og dámdi tær so væl hjá Irdi saman við hinum børnunum, sum øll skuldu byrja í fyrsta flokki nú í summar.

Men so skuldi ikki vera og standa vit spyrjandi hví hetta skuldi henda. Tær untist bert at vera her í ein mánað, tá vanlukkan hendi.

Spurningarnir eru nógvir men vit fáa onki svar, sum Sitha segði tá hon fekka tvita at lítli beiggi hennara var deyður »Hvorfor skulle Allan dø, han var so sød, hvorfor ikke en bandit, eller en gammel mand, som ville dø«.

Okkum er fortalt at tað hava 480.000 børn svomið í hylinum, síðan hann lat opp, men vit ráða ikki yvir lívinum, okkara armar røkka ikki nóg langt. Tað seinasta vit sóu teg, var tá tú so glaður fór rennandi í bilin saman við Bjarna at svimja, við tasku í hond. Mamma og omma tín stóðu í vindeyganum og hugdu eftir tær, tá tú rann oman í bilin.

Tú fylti so nógv í okkara heimið saman við øllum hinum børnunum í familjuni. Vit eru takksom fyri tíðina vit áttu teg og fyri minnini um teg.

Tað var ein vakur dagur tú fórt til gravar og tað lívgaði at síggja ta stóru fjøldina sum var komin at siga tær farvæl. Og sum vit sungu:

*Tað er nakað í Himli hjá*
*børnum at fá*
*tey sum elska sín*
*frelsara her,*
*bæði krúnur og gullhørpur*
*fáa tey tá*
*og ein klædning, sum*
*snjóhvítur er.*

Góðu Annetta og Sri, Sitha og Alexander, mamma og pápi, saknurin er so ómetaliga stórur fyri okkum øll og vit biðja at Harrin hjálpir okkum øllum gjøgnum hesa sváru tíð og signar okkum í komandi døgum.

Hvíl í friði okkara góði Allan.

*Omma, abbi, Diana, Rúni, Sigvør og Bárður við familju*

gult3 cyan3 magenta3 svart3



